Neistin-VB 22-35(10-21):

# VB smurdi Neistan av

**Tað var ongantíð nakar ivi um, hvat var betra liðið, tá ið steypafinalistarnir úr Neistanum sunnudagin høvdu vitjan av oddaliðnum VB.**

SUNSET-KAPPINGIN
*Terji Nielsen,*
*terji@sosialurin.fo*

Fleiri vóru tey, sum í spenningi høvdu sæð fram til dystin á Hálsi fyri at finna út av, um Neistin fór at megna at geva vágskvinnum ein harðan dyst, men tey noyddust at staðfesta, at liðið hjá VB var bæði ein og tveir flokkar betur enn heimaliðið.

### Daiva í serflokki

Tað var longu beinan vegin í dystinum, at kvinnurnar úr Vági prógvaðu fyri teimum gott og væl 100 áskoðarunum, at tær høvdu ongar ætlanir um at taka sær av løttum í dystinum. Tær løgdu seg á odda tíðliga í fyrra hálvleiki, og tær koyrdu á við fullari megi og øktu um leiðsluna so líðandi.

Tað gekk eisini skjótt fyri seg, og ein bóltur fyri og annar eftir reyk í meskarnar hjá Neistanum, sum noyddist at verða landsliðsmálverjan Helenu Poulsen fyriuttan í dystinum móti VB.

Tað var eisini skjótt, at heimaliðið misti mótið, og longu tá ið einans 20 minuttir vóru leiktir av dystinum, hevði VB lagt seg á odda heili 12-6. Síðstu løtuna fyri steðgin gekk tað so heilt galið hjá havnarliðnum, og tær vóru næstan bara statistar til eina VB-uppvísing.



*Annika Thomsen og Marjun Tróndarson í neistaverjuni megnaðu als ikki at steðga Lailu Jespersen og VB í høllini á Hálsi sunnudagin.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað var serliga ein leikari hjá VB, sum skaraði framúr. Daiva Tomaite var heilt stóri spælarin á vøllinum, og hon gjørdi ikki færri enn 17 mál í dystinum. Vanliga skjýtur Daiva nógv mál upp á brotskast, men sunnudagin vóru bert trý av teimum 17 málunum skotin úr sjey metra fjarstøðu.

Sum áðurnevnt legði VB seg tíðliga greitt á odda, og tá ið komið var til hálvleiks, var dysturin langt síðani avgjørdur. Tá høvdu gestirnir úr Suðuroy ein leiðslu upp á heili ellivu mál, 21-10, og tær kundu tí taka sær eitt sindur meiri av løttum eftir steðgin og spara eitt sindur upp á krútið.

Tó spardu tær seg ikki meiri enn so, enn at tær útbygdu leiðsluna hjá sær, og tað hevur óivað givið nógvum neistafólkum nakað at hugsa um, tá ið kvinnurnar hjá teimum tapa so stórt bert eina lítla viku undan steypafinaluni móti Stjørnuni komandi leygardag.

### Neistin-VB 22-35 (10-21)

**Neistin:** Simona Petersen 8(3), Marjun Tróndarson 3, Ása á Neystabø 3, Jórun Ludvík 2, Unn Kragesteen 2, Annika Thomsen 2(1), Kára á Dunga 1, Lív Sørensen 1
**VB:** Daiva Tomaite 17(3), Gurið Mortensen 7, Rannvá Augustinussen 6, Christina Holm 2, Aukse Vysniaskaite 2, Laila Jespersen 1
**Brotskøst:** Neistin 5(4), VB 3(3)
**Útvísingar:** Neistin 3, VB 2
**Dómarar:** Hannis og Uni Wardum
**Áskoðarar:** 130

---

Søljan-VÍF 23-22(13-12):

# Spennandi dystur á Giljanesi

**Dysturin millum Søljuna og VÍF á Giljanesi sunnudagin gjørdist rættuliga spennandi, men tað var heimaliðið sum dróg longra stráið og vann sær bæði stigini.**

SUNSET-KAPPINGIN
*Terji Nielsen,*
*terji@sosialurin.fo*

Ikki óvæntað gjørdist tað ein spennandi dystur, tá ið VÍF sunnudagin fór um Vestmannasund og vestur í Vágar, har tær spældu móti Søljuni.

### Søljan legði bragdliga fyri

Fyrstu løtuna av dystinum sá tað annars út til, at heimaliðið Søljan skuldi vinna ein greiðan sigur. Teir løgdu seg skjótt greitt á odda, og tað gekk sera striltið hjá VÍF at fáa bóltin í málið. Tíbetur fyri VÍF kann man siga, var Manuela Stan í málinum væl uppløgd, at hon syrgdi við nøkrum góðum bjargingum fyri, at Søljan ikki legði sjógv millum seg og gestirnar fyri steðgin.

Eftir at heimaliðið hevði lagt seg á odda 8-3, tók VÍF-venjarin, Sophus Dal-Christiansen, time-out, og tað legði lunnar undir eitt rættuliga comeback hjá vestmannakvinnum. Tær komu fyri seg, og tóku seg skjótt inn aftur á Søljuna, og tí var bert tað eina málið á muni, tá ið komið var til hálvleiks.

Eftir steðgin legði VÍF seg eitt stutt skifti á odda, men so kom stígur í hjá vestmannakvinnum, samstundis sum glið aftur kom á spælið hjá Søljuni. Hetta merkti, at heimaliðið tók leiðsluna aftur, og VÍF megnaði ikki at taka seg fram um Søljuna aftur, og hóast ein góðan endaspurt og eitt gott avrik noyddust vestmannakvinnur tómhentar yvir um sundið aftur.

Av tí at Neistin samstundis tapti fyri VB í Havn, er Søljan nú aftur eitt fet nærri bronsuplássinum. Um so er, at tær megna at vinna seg har upp, er tað einki at taka seg aftur í, at tað er ein stórur sigur fyri lítla hondbóltsfelagið í Sandavági.

### Søljan-VÍF 23-22 (13-12)

**Søljan:** Nicoleta Radu Hansen 8(1), Hertha Jónsdóttir Simonsen 7, Heidi Maria Akselsen 5(2), Lina Andriulyte 2(1), Jana Jacobsen 1
**VÍF:** Nikolina Eyðbjørnsdóttir 8, Finngerð Jensen 3, Eyðritt Andreasen 3, Linda Johannesen 3, Ioana Rapa 2, Manuela Stan 1, Fríða Marjunardóttir 1, Annfríða Helgadóttir 1
**Útvísingar:** Søljan 4, VÍF 3
**Dómarar:** Brandur Johansen og Heri Petersen